# Hvalbingar føla seg trýstar av landsstýrinum

**Suðuroyingar eru ójavnir á málið um, antin landsstýrið legði kommunurnar í Suðuroy undir trýst í málinum um at byggja ellis- og røktarheim á stykkinum í Vági, har ætlanin annars hevur verið at byggja miðnámsskúla**

ELLIS- OG RØKTARHEIM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Kommunurnar í Suðuroy eru ikki samdar um, antin landsstýrið hevur lagt trýst á tær fyri at byggja ellis- og røktarheim á stykkinum á Prestajørðini í Vági, har ætlanin annars hevur verið at at byggja Miðnámsskúla.

Tað er landsstýris–málanevndin hjá Løgting–inum, sum vil hava at vita frá kommununum um tær føla trýst á sær í hesum máli.

Tað ger nevndin, nú Høgni Hoydal, løgtingsmaður, hevur kært landsstýrið fyri landsstýrismálanevndini, tí hann metir, at landsstýrið er farið út út um sínar heimildir í hesum máli.

Í hesum sambandi vil landssýrismálanevndin hava ymsar upplýsingar frá kommununum.

Landsstýrið vil hava kommunurnar í Suðuroy at byggja ellis- og røktarheim á stykkinum í Vági, sum ætlanin annars hevur verið at byggja miðnámskúla.

Men kommunurnar fingu eisini tilboð um serliga lagaliga fígging úr landskassanum til byggingina, tí mett var, at Suðuroyggin var so illa fyri, at annars megnaðu tær ikki uppgávuna.

## Ymsar á máli

Hvalbiar Bygdaráð viðgjørdi spurningarnar frá landsstýrismálanevndini á fundi í gjár. Og har ásannaði bygdaráðið, at tað hevði følt seg undir trýsti frá landsstýrinum.

– Vit fingu heilt greitt at vita frá landsstýrinum, at bygdu vit ikki á stykkinum, sum varð ætlað til miðnámsskúlan í Vági, varð tilboðið um lagaliga fígging úr landskassanum, tikið aftur og tað er at leggja trýst á, segði Levi Niclasen, borgarstjóri í Hvalba.

Annars metti bygdaráðið í Hvalba, at landsstýrið hevði havt sakligar orsøkir til tað, tí ætlanin var at nøkta ein tørv. Undir øllum umstøðum svaraði Hvalbiar Bygdaráð "ja" til spurning tvey sum heild frá landsstýrismálanevndini.

At byggja ellis- og røktarheim í Vági hevur verið eitt sera umstrídd mál og tað er fyribils endað við, at tær fýra kommunurnar í syðru helvt í Suðuroy eru gingnar saman um at byggja eitt heim í Vági.

Men Sumbiar, Vágs, Porkeris og Hovs Kommuna eru ikki samdar í, at landsstýrið hevur lagt trýst á tær.

Tær siga, at talan er um eitt tilboð ella eina áheitan, sum tær hava tikið av.

Fàmjins bygdaráð hevur onga meining um hetta og Tvøroyrar Kommuna hevði ikki svarað í morgun.

## Òjøvn á máli

Hinvegin eru tær ikki heilt samdar um, hvør tað var, sum av fyrstan tíð tók stig til at byggja ellis- og Røktarheim á Prestajørðini.

Onkrar siga, at tað var landsstýrið. Men fleiri vísa á, at upprunaliga tók Vágs Býráð longu í 1987-1988 stig til at byggja ellis og røktarheim á sama stykkið, men tann ætlanin datt niðurfyri.

Tað er eisini alkent, at at Vágs Býráð er í tvíningum í hesum máli. Ein meiriluti upp á fimm býráðslimir tekur undir við ætlanini, men ein minniluti upp á fýra býráðslimir tekur ikki undir við ætlanini.

Og hesin minniluti hevur sína egnu frágreiðing til landsstýrismálanevndini. Og hesin minniluti er samdur við hvalbingum í, at landsstýrið hevur lagt trýst á kommunurnar. Men at ongar sakligar orsøkir eru fyri tað.

Minnilutin metir eisini, at tað var landsstýrið, sum tók stig til ætlanina, tí síðani upprunaliga ætlanin at byggja ellis- og røktarheim á Prestajørðini, datt burtur, gjørdi Vágs Býráð av, at eldraøkið skuldi byggjast út í hinum endanum í býnum, har sambýlið er. Tí ivast minnilutin ikki í, at Landsstýrið hevur tikið stig til hesa ætlanina.

## Misjøvn á máli um tørvin

Landsstýrismálanevndin vil eisini hava at vita, hvussu nógv standa á bíðilista at koma á ellis- og røktarheim.

Og her eru svarini ymiskt.

Minnilutin í Vágs Býráð vísir á, at ellis- og røktarheimið á Tvøroyri er ikki fult, tí nøkur tveymanskømur standa tóm, tí fólk vilja ikki flyta inn.

Hinvegin vísir meirilutin í Vágs Býráð á, at í fjør varð upplýst, at yvir 60 fólk bíðaðu eftir at sleppa á ellis- og røktarheim og at níggju norðoyingar afturat stóðu á bíðilista.

Seinast í fjør høvdu 32 fólk søkt um at sleppa inn á sambýlið í Vági. Seinastu átta mánaðirnar eru átta umsóknir komnar, men ongin er sloppin inn.

Aðrar kommunur vísa á, at tørvurin er stórur, uttan at seta tal á og uppaftur aðrar vísa á lanningina hjá almanna- og heilsumálaráðnum, sum vísir at tørvur er á 32 plássum. Onkrar kommunur vísa eisini á, at ein nýggj kanning um tørvin er á veg.

Men summar kommunur vísa eisini á, bíðilistin er kki eftirfarandi, tí fólk søkja ikki tá ið tey vita, at tey sleppa ikki inn kortini, tí ongi tilboð eru kortini og at tey

Annars eru kommunurnar yvirhøvur samdar um, at mismunur er ikki gjørdur á kommununum Fámjiningar hava onga meining um hetta men minnilutin í Vág Býráð metir, at mismunur er gjørdur á kommununum, tí tilboðið um lagaliga fígging er treytað av, at tær byggja á einum ávísum stykkið. Tað merkir, at hevur ein kommun aðrar ætlanir, herðast fíggingarkrøvini.

Kommunurnar eru kortini samdar um, at enn hava tær onki betalt fyri hetta.

## FAKTA

### 5 spurningar til suðuroyingar

Hetta eru teir fimm spurningarnir, sum Landsstýrismálanevndin vil hava kommunurnar í Suðuroy at svara

1. Eru tað kommunurnar ella landsstýrið, ið av fyrstan tíð tóku stig til at fara undir útbygging av eldrarøktini í Suðuroynni.
2. Hevur landsstýrið lagt trýst á kommunurnar fyri at fáa tær at byggja ellis- og røktarheim, har miðnámsskúlin skuldi vera í Vagi, og um so er, hevur landsstýrið víst kommununum á sakligar grundir fyri hesum.
3. Hvat er veruligi tørvurin á røktarplássum í Suðuroy. Hvussu nógv fólk bíða í løtuni eftir ellis- og røktarheimsplássi í hvørjari bygd í økinum.
4. Halda kommunurnar, at mismunur er framdur millum kommunur í málinum.
5. Hava kommunurnar hildið útreiðslur grundað á, at tilsøgnin um serliga fígging var bindandi.

# Vit skulu standa á tveimum beinum í Evropa

**– Tað, sum nøkur sambandsfólk vilja, letur seg rætt og slætt ikki gera, tí soleiðis er verðin ikki skrúvað saman, sigur Jóannes Eidesgaard, Løgmaður**

EVROPA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

–Tað, sum nøkur sambandsfólk vilja, letur seg rætt og slætt ikki gera.

Jóannes Eidesgaard vísir avgjørdur tí taktikki aftur, sum nøkur oddafólk í sambandsflokkurin vilja hava hann at hava í okkara uttanríkispolitikki.

Samgongan er samd um at Føroyar skulu søkja um limaskap í EFTA. Men samstundis hevur sambandsflokkurin gjørt Løgmanni greitt, at hann eisini skal taka upp samráðingar við ES um treytirnar fyri føroyskum limaskapi í felagsskapinum.

Sambandsfólk halda nevniliga, at EFTA er ikki nummar eitt hjá føroyingum.

– Vit skulu fara eftir tí besta og tað er limaskapur í ES, sigur Johan Dahl í aðrari grein i blaðnum.

## Dømt at miseydnast

Men Løgmaður sigur, at hetta er ein taktikkur, sum er dømdur at miseydnast.

– Tað ber ikki til, at vit seta okkum at samráðast við ES um limaskap upp á kvamsvís. Tað skulu vit bara vita. Ongin kann seta seg at samráðast við ES um limaskap, fyri síðani at taka seg aftur í samráðingunum mitt í tilgongdini við teirri grundgeving, at vit vilja ikki vera limir kortini, vísa treytirnar seg at vera ov harðar.

– Soleiðis er verðin ikki skrúvað saman.

Jóannes Eidesagaard sigur, at skulu vit taka samráðingar upp við ES um limaskap, skal tað vera tí at vit meina tað í fullum álvara og veruliga vilja vera limir, tí samráðingar upp á kvamsvís fer ES ikki at brúka tíð og orku upp á. Vit sleppa aldrin til samráðingar við



*Vit søkja um EFTA limaskap, men avskriva als ikki ES. Og tað er ongin sum sigur, at EFTA er endastøðin, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

ES, kunnu vit ikki prógva, at vit meina tað í álvara. At tað so kanska fellur á eini fólkaatkvøðu, er ein heilt annar spurningur.

– Tí er ætlanin hjá sambandsflokkurin ein taktikkur, sum rætt og slætt ikki letur seg gjøgnumføra.

Men samstundis ásannar Jòannes Eidesgaard, at í løtuni er ikki politiskur meiriluti í Føroyum fyri limaskapi í ES.

– Hvørki Fólkaflokkurin, Javnaðarflokkurin ella Tjóðveldisflokkurin taka undir við ES-limaskapi og tað ger ein partur í sambandsflokkinum kanska heldur ikki.

– Tì er als onki grundarlag fyri at biðja um samráðingar um limaskap, soleiðis sum føroyskur politikkur sær út í løtuni, leggur hann afturat.

Tí heldur Jóannes Eidesgaard, at EFTA limaskapur er tað rætta fyri føroyingar nú. Men hóast Johan Dahl stúrir, er Løgmaður ikki bangin fyri, at Føroyar detta niður ímillum tveir stólar vissi EFTA sindrast um so er, at Noreg ella Ísland fara upp í ES.

– Tað er fiskivinnu–politikkurin hjá ES, sum forðar Noregi og Íslandi at søkja ES um limaskap, tí tey vilja ikki missa stýringina á teirra egna fiskivinnupolitikki. Tað er akkurát sama orsøk til, at ongin undirtøka er í Føroyum fyri limaskapi.

– Tann dagin, Noreg ella Ísland verða limur í ES, er tað tí, at ES hevur slept sentralu stýringini av fiskivinnupolitikkinum í Brússell og letur londini sjálvi umsita síni fiskirìkidømi.

– Og tá er væl eisini stundin komin til at Føroyingar fara at hugsa um limaskap í ES.

## Tvey bein at standa á

Løgmaður staðfestir tó, at hóast vit ikki søkja um limaskap í ES enn, merkir hetta ikki, at vit hava avskrivað ES.

– ES hevur sera stóran týdning fyri Føroyar, tí tað er okkara týdningarmesti marknaður og sostatt skulu vit eisini hava gott samstarv við ES. Føroyar skulu nevniliga hava tvey bein at standa á í Evropa og tey beinini eru EFTA og ES. Vit skulu hava EFTA limaskap og so gott samstarv við ES sum tilber.

Tí tosa føroyingar støðugt við ES um betri samstarv og so seint sum í farnu viku var Løgmaður í Brússell og tosaði við ES myndugleikar um samstarv innan útbúgving og gransking.

Hinvegin staðfestir Løgmaður, at tað hevur verið torført hjá Føroyum at koma upp í ES samstarvið um útbúgvingar, tí vit hava so leyst tilknýti til londini í Evropa.

– Tað er eitt øki, har limaskapur í EFTA kann slóðað fyri, umframt hinar fyrimunirnar, tað hevur fyri okkum.

Løgmaður sigur, at hann kundi hugsað sær, at vit fingu eina avtalu við ES, sum gav okkum tey fýra frælsini hjá hvørjum øðrum altso, at vit fáa ótarnaðan flutning av kapitali, vørum, tænastum og arbeiðsmegi ímillum Føroyar og ES.

– Hetta er ein avtala, sum fleiri lond hava, uttan at vera limur, so tað eigur eisini at bera til hjá okkum.

Hinvegin hevur ongin sagt, at EFTA verður endastøðin hjá føroyingum, tí nógv lond, sum nú eru í ES, eru gomul EFTA-lond.

*So er tað spurningurin um yvirtøkurnar: Ber tað til at verða limur í EFTA, uttan at fremja tær yvirtøkur, sum skulu til?*

– Eg veit, at Sambandsflokkurin er ikki so heitur fyri yvirtøkum, men eitt, sum samráðingarnar við EFTA skulu vísa, er, um tað ber til at verða limur við tí fyrivarni at umrøddu yvirtøkur ikki eru framdar enn, sigur Jóannes Eidesgaard.

Les meir á síðu 5.